# Heiðursbræv

## Virðisløn til ungt listafólk 2024

verður latin

## *Beini Bergsson*

rithøvundi

Beinir Bergsson (f. 1997) úr Sørvági debuteraði við yrkingasavninum *Tann lítli drongurin og beinagrindin* í 2017. Fyri debutsavnið, ið viðgerð sjúku og deyða, fekk hann í 2018 fyrstu Ebbuvirðislønina, ið verður latin ungum rithøvunda, sum hevur víst serligar gávur.

Í næsta yrkingasavninum, *Sólgarðurin*, eru vit farin inn í Sólgarðin, ið bæði er eitt ítøkiligt og eitt ímyndað stað, har vit møta ommuni og abbanum, men mest av øllum eini ørgrynnu av plantum við sansandi erotiskum yrkingum um kærleika millum menn. Bókin hevur vakt stóran ans bæði her heima og uttanlands. Hon varð innstillað til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina í 2022 og er nú týdd til fleiri mál, m.a. enskt, grikskt, íslendskt og danskt.

Náttargarðurin, sum verður komandi og triðja yrkingasavn hansara, heldur fram, har Sólgarðurin slepti.

Í útvarpssendingini Samværi gevur Beinir eitt týdningarmikið og slóðbrótandi íkast til samrøður um føroyska list.

Beinir er útbúgvin MA frá Háskóla Íslands og BA í ritlist frá Fróðskaparsetri Føroya.

Fyri sína týðandi rødd á føroyska listapallinum fær Beinir Bergsson virðisløn til ungt listafólk 2024.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna

23. oktober 2024